## Høgni blátt eyga í Bergen

- Eg var á skeivum stað skeiva tíð, sigur Høgni Hoydal, sum týskvøldið fekk nevan so dygt í andlitið frá einum manni, at hann nú gongur við stórum bláum og hovnum eyga. Tað var meðan flogfarið millumlendi í Bergen á veg til Føroya, at tilburðurin fór fram á einum hotelli í Bergen. Illgerðarmaðurin var ein fullur føroyingur, men av tí at hendingin einki hevði við politikk at gera, og at maðurin bað Høgna Hoydal um umbergin dagin eftir, ger Høgni Hoydal ikki meira við málið. Slagið var so dygt, at Høgni Hoydal mátti á skaðastovuna mikumorgunin áðrenn tingfundin.



*(Mynd: Jens Kristian Vang)*

# Fiskaaling nútímans starvsstovu

**Tað er ein starvsstova í fyrsta flokki, sum nú er latin upp við Áir, og hon er fult á hædd við líknandi starvsstovur í øðrum londum. Fyrsta verkætlanin er longu byrjað**



*Geir Dahle, ráðgevi við 20 ára royndum á økinum, og Hannis Gislason, granskingarleiðari, fegnast um nýggju og góðu umstøðurnar*

GRANSKING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Í gjár var móttøka í sambandi við, at Fiskaaling við Áir tekur nýggja og snotiliga starvsstovu í brúk.

Tað er kortini ikki bygt av nýggjum, men sigast kann, at karmarnir nú eru fyltir nøktandi út.

- Fyrr høvdu vit bert tað eina rúmið, nú hava vit trý, sigur granskingarleiðarin, Hannis Gislason.

Veggkonstruktiónin er fyri so vítt hin sama, men annars sær alt út sum nýtt. Ventilatiónsanlegg er sett upp og alt er málað og snøggað til. Men tað eru um ein so kann siga ytru karmarnir. Tað, sum er fylt út í karmarnar, er nógv meiri áhugavert.

- Vit hava fingið eina fyrsta floks starvsstovu, sum í útgerð agjørt einki stendur aftanfyri aðrar líknandi starvsstovur í londunum kring okkum, sigur Hannis Gislason.

Hetta váttar Geir Dahle, sum hevur tjúgu ára royndir sum fiskagranskari, og hevur sæð hópin av slíkum starvsstovum. Hann er í dag knýttur at Fiskaaling sum ráðgevi.

- Tað einasta, sum haltar eitt sindur, er kapasitetur – og so sjálvandi royndir. Reint útgerðarliga stendur hendan starvsstovan avgjørt ikki aftanfyri aðrar, sigur hann.

### Sum í CSI

Nóg mikið er nú til av arbeiðsplássi, og útbúnaðurin er sum longu nevnt fleiri ferðir tipp-topp. Í øðrum rúminum er pláss fyri granskarum og har er eisini ein maskina, sum útskilir DNA.

Í næsta rúminum eru tey dýrari tólini. Har er fyrst ein maskina, sum kvikliga kann lata útmáldar nøgdir av einihvørjari vætu í royndir. Hetta sparir laborantar og tryggjar móti menniskjansligum feilum.

Inni har er eisini ein sonevndur PCR (Polymerase Chain Reaction), sum eftir stuttari tíð kann margfalda ein DNA-profil, nakað sum er serliga hent, um lítið DNA er til royndina.

Og at enda er største, mest framkomna og dýrasta maskinan av øllum, sonevndi Genetic Analyzer, sum útgreinar DNA-royndirnar. Hetta er ein maskina av sama slagi, sum mest framkomnu starvsstovurnar nýta.

- Sama slag, sum Grissom og tey nýta í CSI, heldur Hannis Gislason skemtandi fyri.

So uttan at taka munnin ov fullar meta bæði Hannis Gislason og Geir Dahle, at nýggja útgerðin á starvsstovuni á Fiskaaling við Áir er »State of the Art«.

Vit fara at hava mikið meiri um Fiskaaling og granskingina, sum nú byrjar av álvara norðuri við Áir í vinnusíðunum í blaðnum týsdagin.



*Fiskimálaráðharrin, Bjørn Kalsø, tosar við Geir Dahle um kongafiskastovnin. Maskinan aftanfyri Kalsø er sonevndi Genetic Analyzer, ein sera framkomið tól, sum Fiskaaling fekk sera bíliga fyri 884.000 krónur. Fyritøkan vildi hava 1,4 milliónir*



*Nógv fólk var komið til móttøkuna fyri at ynskja stjóranum, Ingolfi Joensen (fremst) tillukku*